Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

ÁRSINS SPORTBILUR
er komin á internetið og er bíliga til sølu. Hygg á www.fmf.fo/signar ella ring 222026 - 444946 lokal 20

BÍLIGA TIL SØLU ELLA TIL LEIGU
Sprite Alpina, eginvegin 550 kg, totalvekt 775 kg. Campingvognurin hevur gasskomfýr, vask v/ pumpu og turt wc, køliskáp til gass ella 220w, radi fm, am, lm og bandavspælara + hátalarar. Vognurin hevur tveir benkur aftan + borð og borðplátan kann leggjast niður ímillum og meiri soviplass. Framman eru tveir stuttir benkur + borð og plátan kann eisini leggjast niður ímillum. Vognurin hevur innlagt el 220w. Vognurin kann eisini fáast tómur bíliga.
Tlf. 312604 - 212504

BILUR TIL SØLU
Nissan Sunny 1.6 stationcar, árg. 87, bíliga til sølu. Treingir til ábøtur.
Tlf. 421061 ella 281725

BMW 525 TDS
árg. 92, aut. gear, servo, sóltak, sentrallás, fartpilot og alu. felgur. Bilurin er svartmetall og í sera góðum standi. Til sølu fyri 134.800 kr.
Tlf. 217566 & 217567

CAMPINGVOGN SÆLGES
Árg.89, 5-6 sovepladser, tysk kvalitetsvogn, varme, køkken, badeværelse/toilet, stereo, TV antenne, nye hynder, velholdt, ikke ryger, vægt ca. 1100 kg.
Tlf. 221910 eller 424255 efter kl. 19.

CHEVROLET MONZA
til sølu sum eykalutir.
tlf. 443098

CITROEN AX GT
hvítur árg. 1988, hevur el-rútar, sóltak, sportfelgur, sentrallás og tokulyktir. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 313596 ella 221626

CITROEN BX19
TRS, árg. 87, til sølu.
Tlf. 314213 ella 315622

FORD ESCORT
til sølu fyri 9.000 kr., í góðum standi.
Tlf. 211232

DAIHATSU CHARMANT TIL SØLU
Ein Daihatsu Charmant 1600 frá 86, í góðum standi, til sølu fyri 8000 kr.
Tlf. 281724 ella 441596

DEKK/FELGUR
4 stk. 13-felgur til Ford Escort við brúktum heilársdekkum til sølu fyri kr. 1.000,-.
Tlf. 219161

FORD BRONCO
Ford 4x4 Bronco (jeepur) til sølu. Árg. 1974. V8, 5600 ccm.
Tlf. 225025

FORD FIESTA
árg. 86/87, til sølu fyri 10.000 kr. Er sýnaður í mai 2000. Hevur koyrt 95.000 km.
Tlf. 313094

FORD MONDEO
1.8 I, aut.gear, árg. 94, bert koyrt 43.000 km í sera góðum standi til sølu.
Tlf. 319800 eftir kl. 18

FORD SIERRA 2.0
Sedan, árg. 88, er nýsýnaður, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 218778

FORD VØRUVOGNUR
árg. 98, til sølu. Hevur diesel motor, koyrt 39.000 km.
Tlf. 316183

GÓÐUR BILUR TIL SØLU
Honda Accord, árg. 87, sýnaður í apríl 2000, hevur nýggja kobling og kamreim, bert koyrt 90.000 km, er í sera góðum standi, hevur el-rútar, powerstýring, sentrallás og el-antennu, til sølu fyri bert 25.000 kr.
Tlf. 310998, e. kl. 17

HONDA CIVIC 1.8 VTi
Árg. des. 97, koyrt 55.000 km.
Tlf. 421381 ella 218302

INSTRUMENTBRETTI
Hevur nakar eitt instrumentbretti til ein Volvo Penta MD 2001/2002/ 2003 at selja mær?
Tlf. 314328

JEEPUR TIL SØLU
Galoper T.D., langa modellið, til 7 persónar, 1 ára gamal, v/ skaða.
Tlf. 424513 ella 220421

LEIGA EIN…
ein bil ella buss til 10 ferðandi uttan førara.
Tlf. 317865 el. 282165

LYKTIR TIL DAIHATSU CHARMANT
Vinstra forlykt og báðar baklyktirnar til sølu.
Tlf. 217322

MAZDA 323
árg. 84 í hampuligum standi, við ongum plátum, hevur koyrt 137.500 km ber væl til at gera aftur. Til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 220813 ella 316883 eftir kl. 18

MAZDA 626
Árg. 85, 2.0 sum eykalutir ella heilur.
Tlf. 213571

MITSHU BITSHI
til sølu sum eykalutir, árgang 86–87.
Tlf. 220378

MERCEDES 280 SE
til sølu. 180 HK, nýsýnaður, sær gott út bæði uttan og innan, er í sera góðum standi tekniskt, hevur góð dekk, eyka felgur + motor til eykalutir.
Tlf. 447558 ella 217558

NISSAN PATROL 3.3
Turbo av styttra modellinum til sølu, árg. 87, koyrt 290.000 km, sera væl hildin, ikki–roykjara jeepur við onkrari eyka útgerð. Prísur 52.000 kr. Jeep–áhugaður so ring
tlf. 212079, helst eftir kl. 17

NÓGVIR EYKALUTIR
til Pajero til sølu. M.a. bakhurð, nýggjur forskermur, »Kengurufangari«, hjelmur, powerstýring, spegl. o.a.
Tlf. 217322

OPEL ASCONA 1,6
árg.85 í góðum standi til sølu.
Tlf. 441510

OPEL ASTRA ST. CAR 17 TC TURBODIESEL GL
árg. 95, til sølu. Í góðum standi, nýlakeraður. Vetrardekk fylgja við.
Tlf. 218286

OPEL KADET 1.6 S
Árg. 87, aut. gear, krevur ábøtur.
Tlf. 314471

OPEL KADETT 3
08/03–85, til sølu, er settur.
Tlf. 421582

OPEL RECORD 2.0
Stationcar til sølu sum eykalutir.
Tlf. 443098

PEUGEOT 100 1,6i
til sølu um høskandi boð fæst. Ein økonomiskur bilur, sum orkar væl. Hevur el-rútar, el-spegl, hita í setrunum, fjarstýrt sentrallás og alu. felgur.
Tlf. 219595, e. kl. 18

TIL FORD SIERRA
Árgang 86, eykalutir bíliga til sølu.
Tlf. 221026

TIL SØLU
Mazda 323 1,5 LX, 5 hurðar, árg 4/87 bíliga til sølu. Skal til umsýn 22/8-00, og krevur ábøtur.
Tlf. 441631.

TIL SØLU
2 Daidatsu Charamant til sølu sum eykalutir,annar er frá 1985 og hin er frá 1987.Áhugaði kunnu ringja
tlf.421600 el. 211600

TIL SØLU
Mitsubishi Pajero 2.5 TD langa modellid frá 1988 er til sølu, indregistreradur sum personbilur vid setrum aftan, vælhildin, og monteradur vid anhængaratrek. Motor er nyliga umvaldur og hevur kort 215000 km.
Tlf: 421697

TIL SØLU
Deilir til Ford Orion og Nissan Bluebird. Dynamo, kølara, startara, lyktir og annað til sølu. Alt fyri 450,-
Tlf. 312880

TIL SØLU
Toyota Hi Ace vørubilur, hvítur, árg. 88, til sølu. Prísuppskot 8.000 kr.
Tlf. 211525

TIL SØLU
Fýra 15", hvítar felgur, sum jeepar brúka, til søu fyri 600 kr.
Tlf. 211525

TIL SØLU
Goodyear Eagle F1 dekk til sølu. Stødd 205/55-15 einans koyrt 8000 km. Prísur fyri 4 stk kr. 2.600,- Ring 215686 ella skriva til hans@post.olivant.fo

TIL SØLU
Nýsýnaður Daihatsu Charade CS4, árg. 12/86, til sølu.
Tlf. 319808 - 219808

TIL SØLU
Honda Accord 2.0 exi árg. 88 bíliga til sølu.
Tlf. 211208 ella 441208 eftir kl. 17

TIL SØLU
Daihatsu Charade sera bíliga til sølu.
Tlf. 221618

TIL SØLU
Nissan Bluebird 1.8 turbo, modell U.11.
Tlf. 371532, e. kl. 18

TIL SØLU
Nissan Bluebird 2.0, T12, árg. 1990.
Tlf. 444069

TIL VOLVO 244 GL 1980
Elektriskt yvirgear og hjólskálir úr stáli, diametur 22 cm, ynskist til keyps.
Tlf. 314814

TOYOTA CAMRY 2.0
GLI til sølu. Bilurin hevur el-rútar, powerstýring, centrallás og velour inntrekk.
Tlf. 219005 ella 217192

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
frá '86 til sølu. Bilurin hevur el-rútar, powerstýring, central-lás, digital instrumentbretti og velour inntrekk. Prísur 20.000 kr.
Ring 219005 ella 217192

TOYOTA CARINA 1.6
bensin, árg. 6/87, sýnaður 9/99, havt tríggjar eigarar, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 315246 Helena

TOYOTA COROLLA 1.3
árg. 84–85 til sølu fyri 1.500 kr. Bilurin hevur plátir, men er annars vælegnaður til eykalutir.
Tlf. 217841

TOYOTA COROLLA 1.6
liftback, árg. 87, koyrt 138.000 km, nýsýnaður juli 2000, prísur kr. 16.000,-
Tlf. 310667

TOYOTA COROLLA 1.6 GTi
11 ára gamal, 135 HK. Bilurin er nýliga sproytaður og er í toppstandi. Koyrt 163.000 km.
Tlf. 212280, e. kl. 19

VIÐFESTISVOGNUR
Føroya mest seldi vognur vegna góðsku og snið! Breitt úrval á goymslu í løtuni! Vognar til allar uppgávur!
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

ÚT AT FERÐAST???
So er møguleikin her! Campingvognar kunnu leigast sera bíliga. Vognarnir standa í Thisted. Ring og hoyr meira á
Tlf. 004596193647

VARIANT VOLVO 240
Árg.83 við nummarplátum, góður mortorur og nógvir eikalutir til sølu fyri 3.000,-
Tlf. 443126 ella 220463

VOLVO 240
DL, árg. 85, bíliga til sølu.
Tlf. 220864 ella 444844

VOLVO 240
diesel til sølu. Hevur nýggjan diesel motor, garanti fylgir við. Sýnaður í mai 1999 og hevur el-spegl og rútar, hevur hita í setrinum. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 220528

VW GOLF
Turbo diesel, árg. 93, ABS, servo, 2x airbags í sera góðum standi til sølu fyri 88.000 kr.
Tlf. 421560, SP/f Atlantic Autoimport, Kollafjørður

VW PASSAT 1,9 TD ST. CAR
árg. 94, servo, el-sóltak, sentrallás, ABS, 2xairbag. Bilurin er hvítur og í sera góðum standi. Til sølu fyri 114.800 kr.
Tlf. 217566 & 217567

YNSKIST
Gearkassi til Toyota Camry, árg. 89. Model SV21.
Tlf. 448620. Fartlf. 214620

YNSKIST
Er tað nakar ið kann selja mær tvær forlyktir til Ford Scorpio.
Tlf. 441510

Amboð

BOB CAT
Brúktar Bob Cat garvmaskinur á goymslu 2500 og 3500 kg. Maskinurnar eru í góðum standi. Verða seldar til sera rímiligan prís. Keyp góðsku, motorkraft, maskinurnar til føroysk viðurskifti!
Tlf. 315600, Kaj Andreasen & CO

DEKKAPPARAT!
El- og luftdrivið dekkapparat bíliga til sølu.
Tlf. 281895

FORSKALLINGSAMBOÐ
200 klams og ein spennibjørn, nakrar gevindstengur við møtrikkum, selist bíliga.
Tlf. 422145

LUFTKOMPRESSARI
Ein oljufrían luftkompressari, 250 l. til sølu.
Tlf. 442067

SLÁIMASKINUR
Nakrar ístandsettar »Tielbürger« sláimaskinur til sølu. Eykalutir, søla og service.
Tlf. 284166

TIL SØLU
Ein 2 tons Stenhøj lyftari frá 78, gjørdur í stand í 1994, lítið brúktur, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 318368

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:
❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg❑
Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

TRAKTORUR TIL SØLU
Universal, árg. 97, við sáðiapparati, hoyvendara, silosvans og skuffu.
Tlf. 421021

YNSKIST
Ein tjúgdarhøvil og avrættari ynskist til keyps. Kombineraður ella hvør sær. tjúgdarhøvilin skal kunna taka minst 60 cm breidd. Gamalt/brúkt. Hægst 5.000 kr.
Tlf. 222386

YNSKIST
Ein lítil hond grassláimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 321807 ella 283640 eftir kl. 19

Arbeiði

ARBEIÐI
Alt arbeiði við mini-gravmaskinu verður gjørt, t.d. havar o.a.
Tlf. 217691

ARBEIÐI
Vit søkja eftir einum manni at stilla formar og stoypa okkum útitrappurnar, tað verða uml. 8 trin. Ring
Tlf. 315540

ARBEIÐI SØKIST
24 ára gomul genta søkir arbeiði í Havn, so sum at vaska ella passa børn. Eg eri von við børn.
Tlf. 221056 Beinta

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri ein 17 1/2 ára gomul genta.Havi FHS, men alt hevur áhuga.
Tlf. 310341

ARBEIÐSFÓLK!
Søkt verður eftir arbeiðsfólki til pylsuvogn í vikuskiftum (náttarbeiði) skulu vera yvir 18 ár. Hevur hetta tín áhuga vinarliga ring
tlf. 215858

LONDON?
Hevur tú ætlanir um at fara til London at arbeiða? Eitt gott kamar, við sjónvarpi hjá góðari familju við 2 børnum, kann fáast ímóti 8 tíma húsarbeiði. Srúka klæði og sita barnagenta eitt kvøld um vikuna. At byrja í sept. Vælegna til ein ið ætlar sær at arbeiða ella lesa í London. Hevur tú royndir at ansa børnum? Er hetta nakað fyri teg so ring til Anni
tlf. 00442088887185

NORDPOL-VINDUESPOLERING
v/ Daniel Pedersen
Tilbud på vinduevask gives.
Tlf. 225042

REINGERINGSHJÁLP
Er tað nakar sum hevur brúk fyri reingeringshjálp nakrar tímar um vikuna
ring 361435-321064

UFF!!!
Aftur at gera reint til ólavsøku! Stúr ikki, men hygg her! Ring til Beintu á tlf. 311920 aftan á kl. 12 og eg komi flux og vaski skjótt og væl. Ring nú og slepp undan stríðnum.

Barnaútgerð

BABYLIFT
til sølu fyri 400 kr. Blá við grøn/hvítum puntum, góð madrassa er í.
Tlf. 281212

BARNARIMASONG
til sølu fyri 150 kr., stødd 120x60.
Tlf. 315259

BRIO KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Sera væl hildin. Fótposi og regnslag fylgja við. Kostnaður 1.200 kr.
Tlf. 312032 ella 212260

BARNAVOGNUR
til sølu fyri 500 kr. Vælegnaður at hava í pleyguni.
Tlf. 424516

BILBARNASTÓLUR
av merkinum Chicco upp til 10 kg, í góðum standi til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 315246
Helena

BILSTÓLUR
bíliga til sølu.
Tlf. 319806

BLÁUR
koyristólur við posa til sølu.
Tlf. 315640

HOPPIGYNGA
til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 316016 og 214884

KOYRISTÓLUR
við posa til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 448552

PARAPLY–KLAPPSTÓLUR
við kraftigum stoffi og stelli, og gráum koyriposa bíliga til sølu.
Tlf. 319806

RIMASONG
til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 315259

SILVER CROSS
barnavognur, myrkabláur við regnslagi, kurv og dýnu, til sølu fyri 3.000 kr. Sær ógvuliga gott út.
Tlf. 310494

SIMO BARNAVOGNUR TIL SØLU
Lítil, fittur, í sera góðum standi, vínreyður v/ bláum og hvítum puntum, v/ madrassu og stýrneti. Prísur 1.500 kr. Simo puslitaska og regnskjól kunnu fáast fyri sámuligan prís. Er nýtt.
Tlf. 281212

SIMO KOMBIVOGNUR
Ein 2 ára gamal, myrkabláur Simo kombivognur til sølu. Bert brúktur til eitt barn og í góðum standi. Babylift, puslitaska og madrassa fylgir við. Til sølu fyri Kr. 3000,- Nýprísur Kr. 5.300,-.
Tlf. 313793

TIL SØLU
Myrkagrønur »Silver Cross« barnavognur til sølu. Nýprísur kr. 4.800. Nú kr. 3.500.
Tlf. 332864 eftir kl. 18

TIL SØLU
Ein eitt ára gamal Brio koyristólur við posa + fótposa og regnslagi til sølu fyri 2.500 kr. Nýprísur 3.000 kr.
Tlf. 423258

TIL SØLU
Ein klappstólur til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 423258

YNSKIST
Danimic gittar til trappu ynskist til keyps sum skjótast.
Tlf. 316716

YNSKIST
Bilstólur 9 til 18 kg til sølu.
Tlf. 449482

Barnaansing

AU-PAIR TIL REYKJAVÍKAR
søkist at ansa eftir trimum børnum, 3, 4 og 7 ára gomul, í 1 ár.
Tlf. 00354-5510174

DAGRØKTARMAMMA/ HEIMAGANGANDI
við børnum søkist til at ansa 2 ára gomlum drongi uml. 30 tímar um vikuna frá 1. aug.
Poula og Dávur
Tlf. 212489

Bátaútgerð

17 HK SOLÉ
bátamotorur sundurtikin til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 218999

ER TAÐ NAKAR…
ið eigur ein skerm til eitt ekkolodd av slagnum »Kelvin 703 500 W«, ynskist bíliga til keyps.
tlf. 315885

FØROYSKT BYGDUR BÁTUR
28 fót við 32 HK Leygland Tornycraft til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 441284

MOTORUR
Volvo Penta Aqua 41b 200 HK, diesel, koyrt 700 tímar, til sølu vegna keyp av stórri motori.
Tlf. 315891 el. 310088

MOTORUR
Slag TMD 400, 136 HK til sølu vegna keyp av stórri motori. Er høvisumvaldur, bíliga til sølu.
Tlf. 373797

YNSKIST
Kølari til ein Leyland Tornocraft 60 HK bátamotor.
Tlf. 443173 ella 443201

Bingo

GOTT BINGO
verður í skúlanum í Funningi leygardagin 22. juli kl. 16. At vinna til fulla plátu gávukort á 300 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Drigið verður millum spølini.
Funnings Bygdarfelag

KIWANISKLUBBURIN RÓSAN
hevur bingo í Pálsstovu leygardagin kl. 15. Full plátu 500 kr. + síðuvinningar. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. ein apex flogferð. 15 plátur fyri 100 kr. Eisini verður eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisklubburin Rósan

BINGO
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 17.07 kl. 19.30.
Fjallbrúðir

Burturm. / funnið

FRENSUR BURTURBLIVIN
Gráur frensur við reyðum hálsbandi bleiv burtur 3. juli á Garðavegi í Hoyvík. Um nakar hevur sæð hann ring á
Tlf. 316569

UR BURTURMIST
Á Leynasandi hósdagin 6/ 7. Reimin á urinum er sum ein keta. Hevur nakar funnið tað, so vinarliga ring
tlf. 317359

FOTOTÓL
funnið í haganum (gomlu plenu) í Vestmanna sunnudagin 2.7. Eigarin fær tað við at ringja á
tlf. 424770

FUNNIÐ
Beltið til fo. búna, mynstur smæran. Funnið á jóansøku í Vági.
Tlf. 373299

KAT SAVNES
En grá/sort hunkat er forsvundet fra J.C. Svabosgøta 12, søndag 09.07, har nogen set den?
Tlf. 216251

BAMSA
Ljósabrún bamsa burturmist um borð á Ternuni í Vestmannasundi mikudagin 5. juli kl. 15.45. Í nakkanum á henni stendur Sindre og eitt Oslo-telefon nr. Hevur nakar funnið hana, vinarliga ring
Tlf. 421231 ella 313148

TÚ…
sum av misgávum tók frakkan hjá mær í TB–húsinum leygarkvøldið tann 8/ 7–00. Frakkin er svartur og í lummanum eri ein lykil.
Tlf. 371337, Barbara

Býli

FERÐIST Í SANDOYNNI
Gisti á Mýruni í Húsavík. Vanligir hentleikar t.d. brúsa. Sera vakurt útsýni. Bilin til dyrnar.
Tlf. 318037

FRÍTÍÐ Í MIKLADALI
Njótið friðaligt umhvørvi í Mikladali í frítíðarhúsum við øllum hentleikum.
Tlf. 455267 ella 456939

GISTIÐ BÍLIGA Í MIÐBYNUM
I TÓRSHAVN
Skulu tygum til Tórshavnar at vitja ella bert gista í sambandi við komu ella fráferð til útheimin, hava vit einkult og dupult rúm við morgunmati til leigu. Opið er alt árið.
Tlf. 316301 - 222847

GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIU
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv? Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 313423, 316505, 284705

HALD FERIU Í KBH
Nútímans 86 fermetur íbúð í Keypmannahavn nær við AMAGER CENTRI, við altan til leigu frá 22.–27. juli og 5.–11.august.
Tlf. (0045)40100600

HALDA FRÍTÍÐINA Í KEYPMANNAHAVN
3 rúms íbúð við tveimum altanum, tætt við ráðhúsið, 10 min. til strondina, til leigu frá 22. juli til 11. august.
Tlf. 0045 40 10 06 00
ella 0045 32 96 74 71

HALLÓ TIT
Er tað nakar einsamallur m/k, sum vil deila eina góða stóra íbúð við mær, leiga ca. 1700 kr. um mánaðin, so
skriva til:
bill.mrk. 443871

HALT FERIU Í RUNAVÍK
ella eitt vikuskifti, í góðari íbúð við øllum hentleikum, úti á Mýruni.
Tlf. 447451 best millum 18 og 19

HÚS Í KLAKSVÍK TIL SØLU
Um høskandi boð fæst, eru húsini á Víkavegi 111 til sølu.
Tlf. 455485

HJÁLP!
Ungur friðarligur drongur søkir eftir kamar í Havn sum skjótast.
Tlf. 315318

HÚS Á GLYVRUM
til sølu, um høskandi boð fæst.
Tlf. 448246

HÚS Í RUNAVÍK
til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 448645 ella 220155

HÚS TIL LEIGU/UMBÝTI
I barnavinarligum umhvørvi í Árhus eiga vit randarhús, 92 fermetrar, bert 5 min. at súkkla til miðbýin/universitetið. Er nakar, sum hevur eini hús í Havn, sum vit so kunnu leiga í 1 ár?
Tlf. 004586212630 ella 311603

HÚS VIÐ 4–5…
kømrum ynskist til leigu á Tvøroyri í 1 ár ella longur, helst bíliga.
Tlf. 332134

HÚS YNSKIST
beinanveg ella ein íbúð, ehlst hús. Er okkurt at gera, taka vit eina hond við. Ringið um tit hava okkurt.
Tlf. 361435 ella 321064

HYGG HER
25 ára gamal maður søkir kamar í Havn skjótast tilber. Max. 1.500,- um mánaðin.
Tlf. 219005 Dan

Í SANDOYNNA AT FERÐAST
Við Islandsgarður har vi ledige plasser både í juli og august. Ring sá fár du vite mer.
Tlf. 361726 eller 361119

Í SANDOYNNA AT FERÐAST!
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru vælegnað til bólkar. Nærri frættist á tlf. 361417 - 361334

ÍBÚÐ
søkist skjótast møguligt í Havn.
Vinarliga ring 457096

ÍBÚÐ SØKIST
skjótasta gjørligt, møguligt í Havn ells umkringliggjandi við 2–3 kømur.
Tlf. 216151

ÍBÚÐ SØKIST
Mamma við 3 ára gamlari gentu søkir íbúð í Havn, Argjum ella Hoyvík skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 312615
tpostur:missalda-@yahoo.com

ÍBÚÐ SØKIST
Ungur maður søkir íbúð ella stórt kamar í Havn skjótast gjørligt.
Vinarliga ring 214006 Pætur

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tvær 19 ára gamlar gentur, ið ynskja eina íbúð í Havn. Alt hevur áhuga.
Tlf. 327052,
aftaná kl. 19

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
Trúgvandi, friðarlig, 23 ára gomul genta leitar eftir lítlari íbúð/stórum kamari v/ atgongd til køk og bað í Tórshavn. Hevur fasta inntøku.
Tlf. arb. 314650
Tlf. 443252, e. kl. 17

ÍBÚÐARNEYÐ
Vit eru eitt par, ið hava brúk fyri eini íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Vit hava bæði fast arbeiði, roykja ikki, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 443226
ella 361134

KAMAR SØKIST
25 ára gamal (ungur) maður søkir kamar í Tórshavn skjótast tilber.
Ring tlf. 219005

KAMAR YNSKIST
Ung friðarlig genta søkir eftir kamari at leiga frá 7. aug., atgongd til baðirúm og møguliga køk, royki ikki, drekki ikki, tað skal vera í Klaksvík.
Ring á tlf. 456637

KAMAR YNSKIST Í HAVN
Ung, friðarlig kvinna søkir kamar í 3 vikur í sambandi við summarferiuarbeiði frá 23. juli. Fer væl um, roykir og drekkur ikki. Max. 1.000 kr.
Tlf. 456655
E-post: mula-ndk@yahoo.dk

KEYPMANNAHAVN
3-verilsisíbúð verður leigað út frá 1. februar til 15. apríl næsta ár fyri 4.700 kr. um mánaðin. Nær við Søndermarken, Frederiksbergshave og Rådhusladsen.
Tlf. 33257075

KØMUR TIL LEIGU
Frá 1.aug. eru 2 miðalstór kømur við atgongd til køk og bað til leigu.
bíll. mrk.876020

MAYDAY
Vit eru eitt ungt par, ið søkja eftir einari íbúð. Er tú ein sum veit um onkran útleigara ella kanska er útleigari sjálvur, so vinarliga ring til okkara á tlf. 361379. Tað skal sigast at vit fara væl um, og vit vildu helst at leigan lá um 3.500 v/ ljósi og hita. Tó kann hetta altíð tosast um.
Spyr eftir Anitu

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
E-postur: debes@post.olivant.fo

SUMMARHÚS
í Skálavík til leigu, gott útsýni.
Tlf. 361217 eftir kl. 17

SUMMARHÚS Í HÚSAVÍK
til leig. Standa tætt við strondina. Útsýni yvir alla bygdina.
Tlf. 455565

SUMMARHÚS Í SUMBA
Lítil hugnalig summarhús við øllum vanligum hentleikum til leigu. Standa mitt í bygdini.
Tlf. 444097 ella 222026

SUMMARHÚS Í SUMBA
Tað lítla, hugnaliga, vælvitjaða summarhúsið er aftur til leigu. Húsini hava allar vanligar hentleikar. Standa mitt í bygdini.
Tlf. 444097 - 222026 - 283597

TIL GJÁAR AT FERÐAST
Eini eldri summarhús til leigu við Gjógv, við øllum vanligum hentleikum, so sum vaskimaskina og sjónvarp.
Tlf. 421305 ella 210305

TIL SØLU
Hús á Sevmýru á Tvøroyri bíliga til sølu.
Tlf. 310591

TIL SØLU
Um høskani boð fæst selji eg míni hús á Glyvrum við tveimum íbúðum.
Tlf. 22133747, kl. 19-21